

Mynd: EPA/TORBEN CHRISTENSEN

# Maersk Tankers tjenar meir enn kappingarneytarnir

**Jógvan Hugo Gardar**

02.09.2014 - 19:50

Oljan.fo

Aðalstjórin í Maersk Tankers, Morten Engelstoft, sigur sambært Børsen at fyritøkan roknar við einum marknaðarvøkstri uppá eini trý prosent um árið.

- Hetta er lægri enn tað vit vóru von við árini áðrenn 2008, men hetta er framvegis ein vøkstur sum ger at vit tjena pengar, sigur Engelstoft. Hann boðar samstundis frá at fyritøkan arbeiðir við tiltøkum sum skulu tryggja betri inntøkugrundarlag í reiðarínum.

Shippingwatch skrivar at rakstrarinntøkan hjá Maersk Tankers er átta prosent hægri enn hjá øðrum reiðaríum sum Maersk Tankers kappast við. Um nakrar vikur skal Maersk

Tankers leggja fram eina nýggja ætlan fyri hvussu tey ynskja at reka fyritøkuna tey komandi árini.

Maersk legði í 2013 tær fýra undirdeildirnar  Maersk Tankers, Svitzer, Maersk Supply Services og Damco i eina deild, Services & Other Shipping, har Morten Engelstoft er stjóri.

Málið við hesum er, sambært Shippingwatch, at hesar fýra deildirnar tilsamans skulu geva eitt yvirskot uppá minst 500 milliónir í 2016.